# Sera søgu-ríkt felag

**Í Føroyum kenna vit best BK Frem sum eitt lið, har fleiri dugnaligir føroyskir fótbóltsspælarar hava roynt seg, men niðri er felagið kent fyri sína drúgvu søgu, mongu meistaraheiti og ikki minst trúføstu fjepparar**

Rólant Waag Dam

Seks meistaraheitið og tvær ferðir steypavinnarar. Níggju silvurmerki og seks bronsukrónur. Tað er ikki hvør sum helst, sum ÍF Føroyar skal dystast við í annaðkvøld. Seinastu árini hava tó verið hampiliga turbolent hjá søguríka felagnum, sum er stovnað í 1886 og telist millum landsins elstu.

Í fjør varð liðið flutt niður í Keypmannahavnarseriuna, sum er ein deild omanfyri deildina, ÍF Føroyar spælir í dagliga. Hetta hendi eftir at felagið hevði havt tað ógvuliga trupult fíggjarliga eitt langt skifti, og endaði við at fara á húsagang. Men so seint sum í 2003 spældi BK Frem í bestu fótbóltsdeildini í Danmark.

Tað eru nú átta ár síðani, og tað eru 70 ár síðani seinasta gullkrónan í bestu deildini kom í hús. Somuleiðis er tað langt síðani, at BK Frem ítróttarliga so væl sum fíggjarliga, hevur verið so langt niðri sum júst nú.

Men søgan fornoktar seg ikki, og tað gera mongu viðhaldsfólkini hjá BK Frem heldur ikki. Hóast liðið nú spælir í fimtubestu donsku fótbóltsdeildini, eru áskoðararnir trúgvir sum trølli. Tað eru sjáldan færri enn 500 áskoðarar til dystirnar, oftast fleiri. Tá flest áskoðarar hava verið til dyst í ár, hevur talið verið 1100. Sjálvt á útivølli fylgja áskoðararnir við, og fyrr í ár vóru 300 áskoðarar við og hugdu.

Spyrt tú fjepparanar er heldur eingin ivi. BK Frem hoyrir á ongan hátt heima í Keypmannahavnarseriuni. Ein deild, sum ÍF Føroyar spældi í fyri fýra árum síðani. Hetta vilja teir ikki hava sitandi á sær, og tí skal liðið upp skjótast gjørligt.

Av somu orsøk er tað eisini eitt ófrávíkiligt krav, at BK Frem spælir seg víðari í steypakappingini. Hetta gera teir við at vinna á ÍF Føroyum á Valbys Idrætspark klokkan seks lokala tíð í annaðkvøld.

rolant@sosialurin.fo

## Hópurin móti BK Frem:

Jóhan Viderø Gunnarsson, B36
Niels Joensen, B36
Trygvi Askham, FC Hoyvík
Jákup F. Olsen, FC Suðuroy
Kaj á Stongum, FS Vágar
Emil Nolsøe Leivsson
Jóhan Petur Holm, HB
Páll Mohr Joensen, HB
Rasmus Nolsøe, HB
Rókur av Fløtum Jespersen, HB
Hanus Eliasen, ÍF
Steffan Kalsø, KÍ
Magni Høgnesen, LÍF
Bárður Danielsen, Skála
Andras Kjartansson Thomassen, venjari

*(Felagið er tað, leikarin seinast hevur umboðað í Føroyum)*



*Andras Kjartansson Thomassen er venjari hjá 1. liði hjá ÍF Føroyum. Áður hevur hann vant 2. liði og kvinnuliðið*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

# Størsta upp-gávan nakrantíð

**FÓTBÓLTUR** Í annaðkvøld spæla ÍF Føroyar og BK Frem dyst í donsku steypakappingini. Ein tann størsti dysturin fyri føroyska felagið nakrantíð og tann størsti hjá venjaranum Andrasi Kjartansson Thomassen

Rólant Waag Dam

Nakrir dystir eru størri enn aðrir. Týskvøldið 3. mai klokkan seks verður ein av teimum heilt stóru spældur á Valbys Idrætspark, sæð við føroyskum útiseta brillum. Gjøgnum venjarabrillurnar hjá Andrasi Kjartansson Thomassen er heldur eingin ivi. Hetta er størsti dysturin hjá honum nakrantíð sum venjari. Men Andras gleðir seg. Tað sama gera hansara leikarar, vissar hann um.

– Vit hava koyrt júst sum vit plaga. Sjálvandi tosaðu vit nógv um dystin beint eftir lutakastið, men síðani hava vit hugsað um leikskránna í landskappingini og dystirnar har. Vit fara ikki at venja meiri ella gera alt øðrvísi, tí uppgávan er hendan. Í ÍF Føroyum skulu vit stuttleika okkum, gloyma lesnaðin og arbeiði. Tað skulu vit eisini gera í annaðkvøld, sigur venjarin hjá ÍF Føroyum.

### Øðrvísi uppgávur

Av røttum átti dysturin at verið avgreiddur á Kløvermarkini, heimavøllinum hjá ÍF Føroyum. Men eftir harða veturin minna grasvallirnir har meir um eplaveltir enn nakað annað.

– Tí kannaðu vit møguleikan at spæla á graslíkinum har, men tá tað ikki bar til, valdu vit at flyta dystin á útivøll, fyri at fáa so góðar karmar sum gjørligt. Vit ynskja eitt gott undirlag til góðan fótbólt, og á Valby Idrætspark er eisini møguleiki at vinna felagnum nøkur oyru, tá vit býta inntøkurnar av atgongumerkjum við Frem.

Í so máta er venjara uppgávan í ÍF Føroyum nakað øðrvísi enn flest aðrataðni. Eitt annað dømi um hetta er, at Andras er fegin um, at dysturin er júst nú.

– Hesa tíðina eru nógvar próvtøkur. Tað merkir, at teir allarflestu leikararnir eru í Keypmannahavn og kunnu spæla, fegnast Andras. Fyri tveimum árum síðani spældi ÍF Føroyar í móti AB. Tað var mitt í summarfrítíðini, tá flestu leikararnir vóru heima í Føroyum, sum ikki passaði serliga væl til stóru uppgávuna.

### Eru væl fyri

Andras hevur tikið 14 mans út til dystin. Eitt sterkt lið, heldur hann sjálvur, hóast tveir leikarar ikki eru tøkir. Bergur Midjord hjá B36 fekk ein minni skaða seinasta dyst og er ikki klárur, og tað sama er galdandi fyri Pætur Dahl.

Liðið er eisini vælkoyrandi í løtuni. Síðani Andras tók við sum venjari eftir árskiftið, hevur felagið ikki tapt. Í landskappingini er talan um fýra sigrar og ein javnleik, meðan liðið hølvaði alla mótstøðu av vegnum í venjingardystunum, sum eisini vóru í móti liðum frá somu deild sum BK Frem.

rolant@sosialurin.fo

**»Í ÍF Føroyum skulu vit stuttleika okkum, gloyma lesnaðin og arbeiði. Tað skulu vit eisini gera í annaðkvøld**